# VIKUSKIFTI

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Er tað langt síðani, at føroysk foreldur søgdu børnunum, at tey eitt nú vóru funnin í ánni ella komu við flytifuglum?*

*Bókadeild Føroya Lærarafelags*




# ...og babba hevur sáðkyknur í steinunum í punginum

» - Tupan fer inn í búkin hjá mammu gjøgnum eitt lítið hol. Síðani fer sáðið svimjandi við halanum longri inn«

**BÓKAÚTGÁVUR**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*







Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tvær nýggjar barnabøkur til tey smáu. Onnur bókin nevnist »Mamma varp eitt egg« og hin »Hetta eri eg & hatta er tú«.

Tann fyrra bókin er rættiliga forkunnug. Hon er ein skemtilig, men samstundis ein álvarsom søga um at geva greið boð.

Hvussu svara foreldur, tá børnini spyrja, hvussu tey eru vorðin til? Fáa børnini eitt ærligt svar?

Bókadeildin spyr í tíðindaskrivinum, um tað er langt síðani, at føroysk foreldur søgdu børnunum, at tey eitt nú vóru funnin í ánni ella komu við flytifuglum.

Kanska vit framvegis royna at billa børnunum okkurt býtt inn, tó at tey rættiliga skótt ána betur, enn tey vaksnu gruna.

Foreldrini í hesari bókini hava nógv ymisk boð um, hvussu børn verða til, eisini at mamman varp eitt egg, at tað sprongdist, og at tey komu út við fúkandi ferð.

Tí mugu tey gløggu børnini rættleiða foreldrini og greiða teimum frá, hvussu tey veruliga vóru til.

Á skemtiligan, men greiðan hátt siga børnini frá, hvussu eggið og sáið hittast, og hvussu alt hetta endar við, at eitt lítið liðugt barn smoyggir sær út úr mammuni.

So tey foreldur, ið enn ikki við egnum orðum hava kunnað børnini um nøringina, tey hava nú møguleikan við at ogna sær bókina, sum er 30 blaðsíður.

Høvundurin hevur myndprýtt sjálv, og Ingibjørg W. Kamban hevur týtt til føroyskt.

Mamma varp eitt egg kostar 120 kr.

**Hvør eri eg?**

»Hetta eri EG & hatta er TÚ« er ein klaffabók, sum Símun av Skarði hevur týtt úr týskum.

Hon er ætlað børnum frá 2 ára aldri og er um likamslutir, hvat teir eita, og hvat teir eru til; um sansirnar, munnin t. d., sum bæði kann brúkast at eta við, men eisini at flenna, syngja og mussa við; um sinnalagið, um at vera sjúk; um hvat einum dámar og ikki dámar.

Bókin leggur upp til, at foreldur tosa við barnið um tað, sum bókin er um, børnini verða beinleiðis spurd ymsar spurningar, ið hava samband við kropp og sál.

Bókin er 16 bls., er úr hørðum pappi og hevur snyrilsrygg.

Hon kostar 90 kr.

Petur Skeel Jacobsen um vikuskiftisveðrið:

# Gott veður til sjómannadagin



Tað verður lítil vindur, yvirhøvur turt og nakað av sól. Tað verður lýtt í veðrinum, eini 13-17 stig. Tað kunnu eisini koma mjørkaflókar, men í Klaksvík skulu tey vænta sær gott stevnuveður, nú hópin av fólki savnast har til árliga sjómannadagin.

Aftan á vikuskiftið kemur broyting í veðrið. Týsdagin ella mikudagin kemur hann lágt við vindi og regni og hitin verður um 10 stig.

Hósdagin 24. august er bartalsmessa, sum er fyrsti heystardagur.

- So tað passar so væl, at vit hava summaveðrið nú í vikuskiftinum, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður.